# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14.02.2023 |
| Mál nr.: | 23/03855 |
| Málsviðgjørt: | JS/TM/BAB |
| Ummælistíð: | - |
| Eftirkannað: | 09. februar 2023 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**lántøku til landskassan fyri 2023**

**§ 1.** Landsstýrismanninum verður landskassans vegna heimilað at taka í mesta lagi 350 mió. kr. í láni til at rinda fyri møguligt gjaldførishall landskassans í 2023.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Sambært § 11 í løgtingslóg nr. 116 frá 24. november 2016 um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð skal landskassin hava eitt minsta gjaldføri, svarandi til 15% av BTÚ. Minstagjaldførið frá 1. januar 2023 er hækkað við 350 mió. kr. til 3,4 mia. kr.

Fíggjarmálaráðið roknar við, at landskassin hevur avlop í bæði 2022 og 2023. Framfluttar støðlingar (ikki brúktar løgujáttanir) eru hinvegin stórar. Nøktandi gjaldføri er sostatt ikki til at fíggja økta minsta gjaldføri, hóast avlop.

Endamálið við hesum lógaruppskoti er tí at útvega landsstýrinum heimild til at læna eina peningaupphædd, sum kann tryggja landskassanum neyðuga gjaldførið í 2023.

*Lán landskassans*
27. juni 2023 fella 550 mió. kr. til gjaldingar á brævaláninum FO-LB230627. Lánið er eitt standandi seks ára lán, sum varð tikið í 2017.

| Navn | Upptøka | Afturrindan | Nominell upphædd | Effektiv renta við lántøku |
|---|---|---|---|---|
| **0,625% Fø.Landst. 2023** | **27. juni 2017** | **27. juni 2023** | **550.000.000** | **0,5900%** |
| 1,81% Fø. Landst. 2032 | 3. mai 2017 | 3. mai 2032 | 447.882.736 | 1,8100% |
| 0% Fø. Landsstýrið 2022 | 2. juni 2020 | 2. juni 2022 | 1.300.000.000 | -0,0810% |
| 0,125% Fø. Landsstýrið 2025 | 2. juni 2020 | 2. juni 2025 | 1.645.000.000 | 0,1850% |
| 1,25% Landsstýrið 2024 | 2. juni 2022 | 2. juni 2024 | 1.100.000.000 | 1,2540% |

Sambært løgtingslóg nr. 116 frá 20. desember 1991 um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum, kann landskassin taka lán til endurfígging upp til eitt ár frammanundan, lánið fellur til gjaldingar.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært løgtingslóg nr. 116 frá 20. desember 1991 um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum, er heimild at taka lán til endurfígging upp til eitt ár frammanundan, at lánið fellur til gjaldingar. Um skuldin økist, er neyðugt við serstakari løgtingsheimild.


### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Tað krevur samtykki Løgtingsins at økja um skuld landskassans. Tí er neyðugt at leggja uppskot til løgtingslóg fyri Løgtingið, sum heimilar økta lántøku.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Mett verður, at tørvur verður á, umframt endurfíggingina av teimum 550 mió. kr., at taka upp til 350 mió. kr. afturat fyri at uppfylla kravið um 15% minstagjaldføri. Hóast bruttoskuldin við hesum økist, so er nettoskuld landskassans tann sama. Lántøkan verður í mesta lagi 900 mió. kr., og er tað treytað av, at tað ikki verður hall í fíggjarlógini fyri 2023.

Í myndini niðanfyri sæst gongdin á 2, 5 og 10-ára DKK swap-rentunum frá 1. juni 2022 til í dag.




Sum tað sæst á myndini, hevur marknaðurin verið sera skiftandi, og torført er at meta um, hvat hendir við rentunum í mánaðunum, sum koma.

Landsbankin mælir til, at lógarheimildin at økja skuldina verður útvegað sum skjótast. Er heimildin fingin til vegar at økja skuldina, ber til hjá Landsbankanum at handla skjótari og taka lánið, tá umsitingin metir, at tað loysir seg best. Tí verður biðið um heimild at økja skuldina saman við uppskotinum til Løgtingsfíggjarlóg fyri 2023 Tá ber eisini til at taka atlit til endaliga úrslitið í fíggjarlógini fyri 2023.

| | **Mia kr** | **Viðmerkingar** |
|---|---|---|
| Gjaldføri 27. januar 2023 | 3,14 | Íroknað hesum er úrslitið 2022. |
| Væntaðar eftirbókingar fyri 2022 | 0,03 | Nettotal. Talan er bæði um inntøkur og útreiðslur |
| RLÚ 1 úrslit 2023 | 0,14 | Sambært uppskot til fíggjarlóg |
| Støðlingar (løgur) | -0,26 | Roknast kann við, at nýtslan av framfluttum løgum frá 2022 til 2023 kann verða millum 150 til 300 mió. kr. |
| Saldo | **3,05** | |
| Minstagjaldføri 2023 | 3,40 | Sambært lóggávu 15% av BTÚ |
| **Neyðug lántøka** | **0,35** | Hetta umframt at endurfíggja lán á 550 mió. kr., sum fellur til gjaldingar í juni 2023 |

Sum sæst á talvuni omanfyri, vanta á leið 350 mió. kr. í, fyri at landskassin hevur 3,4 mia. kr. í minstagjaldføri í 2023. Talið er treytað av endaliga úrslitinum í 2022, úrslitinum fyri 2023, og hvat verður brúkt av støðlaðum løgum í 2023.

Tað skal viðmerkjast, at hóast bruttoskuldin økist, so økist nettoskuldin ikki.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis. Talan er um eitt fíggjarlógartekniskt uppskot. Uppskotið er gjørt í samráði við Landsbankan.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Netto landskassaskuldin økist ikki við uppskotinum. Uppskotið skal tryggja landskassanum neyðugt gjaldføri í 2023.

Við uppskotinum tekur landskassin eitt nýtt lán uppá í mesta lagi 900 mió. kr. Lánið kemur ístaðin fyri eitt 550 mió. kr. lán, sum varð tikið í 2017 við einari effektivari rentu á 0,59%. Tað lánið hevur kostað landskassanum 3,2 mió. kr. árliga.

Soleiðis sum rentan er í løtuni fyri 3 ára til 5 ára lán, verður kostnaðurin av at taka lán á 900 mió. kr. helst millum 30 og 35 mió. kr. árliga.

Roknast kann við øktari inntøku av meirgjaldførinum uppá 350 mió. kr. Metta avkastið er 2,5%, svarandi til einar 9 mió. kr. Samanumtikið verður roknað við, at árligu nettoútreiðslurnar av lógaruppskotinum verða umleið 20 mió. kr.

Talvan niðanfyri vísir mettu rentuútreiðslurnar fyri 2023-2026. So hvørt sum lán skulu endurfíggjast hækkar rentuútreiðslan, tí rentan, sum landskassin skal rinda fyri endurfíggingarlánið, er hægri. Umframt at rentan er hækkað nógv, er neyðugt hjá landskassanum at økja bruttoskuldina í 2023, tí minstagjaldførið krevur tað.

Talva: Rentuútreiðslan 2023-2026, mió. kr.

| Ár | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|
| Mett renta | 42.550 | 72.310 | 117.785 | 142.550 |
| Aðrar rentur og kostnaður at taka lán | 4.000 | 4.000 | 4.000 | 4.000 |
| Tilsamans | 46.550 | 76.310 | 121.785 | 146.550 |

Kelda: Landsbankin

Fíggjarmálaráðið hevur innroknað hesa rentumeting í fíggjarlógaruppskotið fyri 2023.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og tað verða heldur ikki gjørd onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki við sær skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum landskassans vegna at taka lán til landskassan fyri 2023

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Greinin ásetir hámarksupphæddina, sum landsstýrið fær heimild at læna til møguligt gjaldsførishall landskassans í 2023.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 14. februar 2023

**Ruth Vang**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason